Vejle er á triðja plássi

Aftur hesa ferð var Christian Høgni Jacobsen allar 90 minuttirnar á vongverjanum í høgru

DANMARK 1. DEILD
Jóannes Hansen

Johan Byrial Hansen er nú aftur í barndómsfelagnum, AC Horsens, sum um vikuskiftið fekk sín fyrsta sigur. Sjálvur var Johan tó ikki á vøllinum. Hann telist í løtuni millum skaddu leikararnar hjá Horsens, sum eru fleiri í tali

Vejle er á triðja plássinum í næstbestu deildini. Sunnudagin vunnu teir 3–0 á heimavølli ímóti B1913 úr Odense. Christian Høgni Jacobsen var vongverji í høgru, og hann spældi alla tíðina.

Spælið var ikki so sannførandi hjá heimaliðnum. Í 1. hálvleiki var B1913 meiri ágangandi, og teir høvdu onkrar møguleikar at gera mál, men tað var málleyst í steðginum.

Bara 28 sekund vóru farin av 2. hálvleiki, tá Vejle legði seg framum. Tommy Knudsen sendi bóltin innfyri, eingin fekk tak á honum, og so sigldi hann í mála. Hóast leiðslumálið til heimaliðið, so vóru gestirnir framvegis væl við. Men tá Vejle eftir ein tíma fekk brotsspark, var tað greitt, at øll stigini fóru at vera í Vejle. Liðformaðurin Calle Facius varð feldur í gjøgnumbroti í høgru, og hann skoraði sjálvur.

Tá tað restaðu átta minuttir staðfesti álopsmaðurin Jerry Brown.

Einki lag

Hóast Vejle er nummar trý, og teir harvið eru væl við í kappingini at sleppa upp aftur í superliguna, so hevur fótbóltslagið í Vejle ofta verið betri, enn tað er nú. Í góða summarveðrinum, sum ongan endi tykist vera á í Danmark, vóru 1.138 áskoðarar møttir í Nørreskóginum. Sammett við aðra staðni, har teir spældu í 1. deild, var talið ikki so galið, men sammett við, hvussu nógvir áskoðarar plaga at vera til fótbólt í Vejle, so var talið einki at reypa av.

Timburmenninir eftir niðurflytingina í summar gera framvegis um seg. Tað verður roknað við, at niðurflytingin kostaði fýra milliónir krónur.

Í vikuskiftinum var greitt, at Vejle ongan høvuðsstuðul fer at hava um tvær vikur. Tann, sum hevur verið fyribils stuðul, meðan teir hava leitað eftir einum nýggjum, hevur nú tikið seg aftur. Tað ger hann sum mótmæli ímóti, at Vejle fyrr í summar segði stjóran úr starvi. Tað gjørdi Vejle fyri at spara, og nú tykjast teir vera í óndu ringrásini, sum tað altíð er torført at sleppa burturúr aftur.

Oddaliðini snávaðu

Undan hesum umfarinum var Ølstykke á odda í næstbestu deildini. Teir taptu púra óvæntað á heimavølli ímóti B93. Frem hevur eisini verið roknað millum bestu boðini upp á uppflyting. Eisini teir snávaðu á heimavølli ímóti einum av teimum smáu. Skjold vann 2–0 í Valby.

Randers Freja er nýtt oddalið. Men teir fingu heldur ikki fulla úrtøku. Fredericia, sum eina góða løtu spældi við tíggju monnum, megnaði 1–1 í Randers.

HFK Sønderjylland kom nærri toppinum, tá teir vunnu 3–0 í Hellerup ímóti HIK.

FC Aarhus nýtti eisini høvið at klatra nærri toppinum, tá teir í Odense vunnu 1–0 á B1909, og Horsens vann 3–1 á Tingbjerg stadion í Keypmannahavn ímóti Brønshøj. Johan B. Hansen telist nú millum spælararnar hjá Horsens, har hann eisini var, áðrenn hann flutti til OB. Men hann var ikki við í Brønshøj, tí hann er skaddur.

Herfølge og Hvidovre skuldu spæla í gjárkvøldið.

Danska superligan

	d	v	-	j	-	t	v mál	t mál	+/-	stig
1 AaB	8	5	-	1	-	2	12	9	3	16
2 FCK	8	4	-	2	-	2	12	13	-1	14
3 OB (S)	8	4	-	1	-	3	16	10	6	13
4 AGF	8	3	-	3	-	2	13	12	1	12
5 Farum	8	4	-	0	-	4	11	13	-2	12
6 Brøndby (M)	8	3	-	2	-	3	15	11	4	11
7 FCM	8	3	-	2	-	3	13	12	1	11
8 Esbjerg	8	3	-	2	-	3	17	20	-3	11
9 Viborg	8	2	-	4	-	2	16	14	2	10
10 Silkeborg	8	2	-	2	-	4	8	10	-2	8
11 AB	8	2	-	2	-	4	10	13	-3	8
12Køge	8	2	-	1	-	5	12	18	-6	7

Føroyskir leikarar: Todi Jónsson (FCK)

Danska 1. deild

	d	v	-	j	-	t	v mál	t mál	+/-	stig
1 Ølstykke	8	4	-	3	-	1	18	15	3	15
2 Randers F.	8	5	-	1	-	2	22	13	9	16
3 Vejle	8	4	-	2	-	2	12	8	4	14
4 Frem	8	4	-	2	-	2	15	13	2	14
5 Herfølge	7	4	-	1	-	2	18	13	5	13
6 HFK Sønderj.	8	3	-	3	-	2	21	19	2	12
7 Fredericia	8	3	-	3	-	2	11	11	0	12
8 Skjold	8	3	-	2	-	3	11	9	2	11
9 B 1913	8	3	-	2	-	3	14	15	-1	11
10 B93	8	3	-	1	-	4	14	13	1	10
11 FC Aarhus	8	3	-	1	-	4	13	13	0	10
12 Brønshøj	8	2	-	3	-	3	10	10	0	9
13 Hvidovre	7	2	-	2	-	3	11	17	-6	8
14 B 1909	8	1	-	3	-	4	12	17	-5	6
15 AC Horsens	8	1	-	3	-	4	11	17	-6	6
16 HIK	8	2	-	0	-	6	5	15	-10	6

Føroyskir leikarar: Christian Høgni Jacobsen (Vejle), Atli Gregersen (Randers Freja),
Johan Byrial Hansen (AC Horsens)

Bara gullið telur hjá Laudrup

Eftir higartil sera trilvandi avrik eydnaðist tað endiliga hjá Brøndby at vísa sannførandi spæl og at vinna á oddaliðnum

SUPERLIGAN
Jóannes Hansen

Michael Laudrup veit, hvat tað snýr seg um. Í tíðini í Juventus, Barcelona og Real Madrid var tað gerandiskostur hjá honum, at nógv hóvasták varð gjørt burturúr, og at trýstið á honum og feløgunum var ógvusligt.

Tí er tað kanska ikki so undarligt, at hann leggur stórt trýst á seg sjálvan, nú hann er vorðin venjari í Brøndby, sum er tað felagið, ið hevur vunnið mest í Danmark seinastu tjúgu árini.

Sunnudagin gekk tað væl betri hjá Brøndby, enn tað hevur gjørt higartil í nýggju superliguni. Teir vóru á heimavølli ímóti oddaliðnum OB, og tað var eingin ivi. Teir í Brøndby vóru agressivir og væl upplagdir, og teir vunnu heilt uppiborið 2–0.

Eftir dystin staðfesti Michael Laudrup, at fyri hann og felagið er einki annað nóg gott enn tað, at teir endurvinna meistaraskapin. So vita Todi Jónsson og hinir í FCK tað.

Við tepra men uppiborna 1–0 sigrinum á heimavølli ímóti AB, syrgdi FCK fyri, at teir framvegis eru væl við í toppinum. Talan var um besta avrikið í hesum kappingarárinum. Úrslitini hava verið hampulig, men spælið hevur ikki verið felagnum verdugt, halda teir í FCK, og harvið leggja teir eisini trýst á seg sjálvar.

Esbjerg á botni

Tað er so stutt frá tindinum og á botnin. Eisini í fótbólti. Tað kundu teir í Esbjerg væl skriva undir uppá sunnukvøldið. Eftir at teir mikukvøldið vunnu 3–0 á heimavølli ímóti FCK og vóru róstir upp til skýggja, so fóru teir fullkomuliga niður við nakkanum sunnudagin.

Í Viborg, har heimaliðið hevði havt sera jánkasliga byrjan upp á nýggja kappingarárið, tapti Esbjerg 6–0, eftir at støðan í steðginum hevði verið 3–0.

Álopsspælarin Sasho Petrovski er í Viborg, men undan sunnudegnum hevði tað einki ligið fyri hjá australiumanninum. Hesa ferð gjørdi hann ein orduligan vørr. Hann skoraði trý av málunum, og makkarin hjá honum – karismatiski Søren Frederiksen – skoraði tvey.

Longu leygardagin vann Farum 1–0 á Køge. Hetta var fyrtu ferð yvirhøvur, at Farum vann á hinum uppflytara liðnum, sum nú er illa fyri í botninum.

AaB er aftur í toppinum. Gestirnir úr Silkeborg vóru tætt við í 1. hálvleiki,t á teir sendu í stólpan, men fýra minuttir eftir steðgin skoraði estlendski Andres Opter, og so var liðugt. Silkeborg fekk í síðstu løtu brotsspark, men Jimmy Nielsen í AaB málinum bjargaði.

AGF kom enn eina ferð ósigrað undan, eftir at teir tvær ferðir høvdu verið undir. Í Ikast var úrslitið 2–2. Morten Poulsen, sum nú er toppskjútti í superliguni, skoraði annað málið, og Brian Steen Nielsen skoraði hitt. Í báðum førunum var talan um langskot.

Norska tippeligan

	d	v	-	j	-	t	v mál	t mál	+/-	stig
1 Rosenborg (M)	22	14	-	4	-	4	45	26	19	46
2 Lyn	22	14	-	3	-	5	31	22	9	45
3 Molde	22	13	-	4	-	5	37	19	18	43
4 Viking	22	9	-	10	-	3	39	25	14	37
5 Stabæk	22	10	-	5	-	7	35	27	8	35
6 Odd. Grenl.	21	10	-	3	-	8	30	26	4	33
7 Våleranga	22	6	-	10	-	6	31	25	6	28
8 Sogndal	22	8	-	3	-	11	30	41	-11	27
9 Lillestrøm	22	7	-	5	-	10	28	28	0	26
10 Bodø/Glimt	22	7	-	4	-	11	32	34	-2	25
11 Bryne	22	7	-	4	-	11	33	36	-3	25
12 Brann	21	7	-	3	-	11	29	39	-10	24
13 Moss	22	5	-	5	-	12	23	38	-15	20
14 Start	22	2	-	5	-	15	20	57	-37	11

Føroyskir leikarar: Jákup Mikkelsen (Molde)

Amagermeistaraskapið

Fýra føroyingar luttaka í kappingini, og eftir trý umfør eru tveir av okkara monnum á odda

TALV
Carl Eli Nolsøe Samuelsen

Síðani miðskeiðis í 90´unum hava føroyingar á hvørjum árið verið við at mynda Amagermeistaraskapið við góðum úrslitum. Eitt nú vann John Arni Nilssen kappingina í 2000. Kappingin er altíð sterk, er væl fyriskipað, samstundis sum kappingini er ein góð upphiting til donsku liðkappingina, sum byrjar seinni í heyst.

Fylgjast kann við Amagermeistaraskapinum á http://www.amsf.dk/AMS2002/index.html, har tann forvitni eisini hevur møguleikan at hyggja øll talvini ígjøgnum.

Teir fýra føroyingarnir talan eru um, eru Heini Olsen, Eyðun Nolsøe, Carl Eli Nolsøe Samuelsen og Arild Rimestad, sum allir telva við føroyska talvfelagnum í Keypmannahavn. Heini Olsen hevur trúfastur luttikið á hvørjum árið síðani 1999, tá hann bleiv nr. 2. Hann er styrkismettur sum nr. trý av teimum 50 luttakarum, og er tí ein av favorittunum í ár.

Eyðun og Carl Eli, sum ikki hava luttikið í AM fyrr, eru eisini millum favorittarnar ávíkavist styrkismettir nr. fýra og fimm. Fyri Heina og Eyðun er kappingin ein nærum neyðug venjing, nú Talvolympiadan byrjar um ein góðan mánaða.

Stigini skola inn

Sjey umfør skulu telvast, og trý eru telvd um vikuskifti. Kappingin endar komandi sunnudag. Heini og Eyðun tykjast vera væl fyri, og hava báðir fult stigatal. Teir hava báðir bert hitt telvarar við lægri ratingtølum, men jú longri inni í kappingini verður mótstoðan sterkari hjá teimum, sum liggja í oddinum. Fýra telvarar hava fult stigatal.

Carl Eli og Arild hava tvey stig. Hesin fyrri vann fyrsta umfar, men hevur síðani leikt tveir javnleikir. Arild tapti ímóti Heina í øðrum umfari, men hevur vunnið hini bæði umførini, og er tískil eisini væl við í oddastríðnum. Alt í alt eitt væleydnað føroyskt talvvikuskifti á oyggjuni Amager.

Nevnast kann at hálvføroyingurin Miriam Olsen, sum nú telvar fyri Danmark, eisini luttekur. Í fjórða umfari sleppur hon at royna seg ímóti greinskrivaranum.

Aðalfundur

Talvsamband Føroyar hevur aðalfund leygardagin 21. september. Fundurin verður hildin á Hotel Hafnia kl. 14.00. Meira um fundin er at lesa á www.faroechess.com.



Kr. 300,00 Mikukvøld 19.00 – 21.35 Sólvá Mørkøre Sankta Frans Skáli
Kr. 300,00 Tysdag 16.00 – 19.30 Verkstaðið Vón
Almy Djurhuus, Lisabeth Hansen,Hedvig R. Davidsen, Regin Samuelsen,Oddvør Petersen, Anna Maria E. Antoniusen og Mirjam J.R. Olsen
Kr. 300,00 Mánakvøld 18.30 – 21.05 Sólvá Mørkøre Venjingarskúlin
Kr. 300,00 Mánadag 16.25 – 19.00 Susanne Nielsen Skálin á Tróðni
Kr. 300,00 Mánadag 19.10 – 21.45 - Skálin á Tróðni
Kr. 300,00 Tilmelding tlf. 31 68 61
Kr. 300,00 Mánadag 16.25 – 19.00 Susanne Nielsen Skálin á Tróðni
Kr. 300,00 Mánakv. 19.10 – 21.45 -
Kr. 300,00 Tilmelding tlf. 31 47 66
Kr. 300,00 Frúggjadag 11.30 – 14.05 Arngerð Joensen Skálin á Tróðni
Kr. 350,00 Hóskvøld 19.00 – 19.45 Tina Jacobsen Eystursklúin
Kr. 350,00 Hóskvøld 19.45 – 20.30 Katrin D. Johansen
Kr. 350,00 Tilmelding tlf. 31 75 79 og tlf. 21 67 60
Kr. 350,00 Mánakvøld 18.15 – 19.00 Katrin D. Johansen Eystursklúin
Kr. 350,00 Tilmelding tlf. 31 75 79 og tlf. 21 67 60
Kr. 350,00 Mikudag 16.00 – 17.30 Jóhan M. Stenberg Eystursklúin
Kr. 300,00 Tilmelding tlf. 31 75 79 og tlf. 21 67 60
Kr. 300,00 Mánadag 16.00 – 16.45 Tóra Hansen og Eystursklúin
Kr. 300,00 Mánadag 16.45 – 17.30 Katrin Bech
Kr. 300,00 Tilmelding tlf. 31 75 79 og tlf. 21 67 60
Kr. 300,00 Mikukvøld 17.00 – 18.30 Svimjihøllin
Katrin D. Johansen, Maria á Boðunesi,Tóra Hansen, Katrin Bech, Ingolvur Gunnarson, Elna S. Hansen, Jóhannis Joensen og Marta Tausen
Kr. 300,00 Tilmelding tlf. 31 75 79 og tlf. 21 67 60 Læraraskúlin
Dan Lambhauge, Tina Jacobsen, Jóhannis Joensen og Petur Niclasen
Kr. 300,00 Tilmelding tlf. 31 75 79 og tlf. 21 67 60
Kr. 300,00 Tysdag 16.30 – 18.00 Tina Jacobsen, Petur Niclasen Skálin á Tróðni
Kr. 300,00 Tilmelding tlf. 31 75 79 og tlf. 21 67 60
Kr. 300,00 Frúggjadag 15.30 – 17.00 Johan Stenberg Sankta Frans Skáli
Kr. 470,00 Tysdag 16.00 – 17.30 Dan Lambhauge Skálin á Tróðni
Kr. 470,00 Tysdag 17.30 – 19.00 Ingolvur Gunnarson -
Kr. 470,00 Tilmelding tlf. 31 75 79 og tlf. 21 67 60
Kr. 470,00 Hósdag 16.00 – 17.30 Ingolvur Gunnarson Skálin á Tróðni
Kr. 420,00 Tilmelding tlf. 22 77 00 Kaj Johannesen Skansastova
Kr. 420,00 Tilmelding tlf. 22 62 42 - 31 41 88 Skansastova
Kr. 100,00 Mánadag 15.30 – 18.00 Heinesens hús
Kr. 100,00 Frúggjadag 15.30 – 18.00 -
Kr. 100,00 Tysdag 15.00 – 18.00 -
Kr. 100,00 Mikudag 15.00 – 18.00 -
Kr. 570,00 Tilmelding tlf. 31 99 15 Randi Gunnarsdóttir Heinesens hús
Tysdag 16.00 – 18.30
Kr. 570,00 Tilmelding tlf. 32 20 17 – 31 77 55 Rannvá Jacobsen -
Tískvøld 18.45 – 21.15
Kr. 100,00 Tilmelding tlf. 31 22 17 Margarinfabrikkin
Mikudag 15.00 – 18.00 Finn Jespersen
Kr. 100,00 Tilmelding tlf. 31 22 17 Margarinfabrikkin
Mikudagur 15.45 – 18.45 Karl Anton Klein
Kr. 100,00 Tilmelding tlf. 31 22 17
Mikudag Rannvá Jacobsen
Kr. 100,00 Tilmelding tlf. 31 22 17
Mánadag 19.00 – 22.00 Jákup Veyhe -
Kr. 100,00 Tilmelding tlf. 31 77 55 – 25 46 40 Sjónleikarahúsið
Tysdag 14.00 – 15.30 Hedvig Westerlund
Tilmelding tlf. 31 77 55 – 25 46 40
Tysdag 15.30 – 17.00 Hedvig Westerlund Sjónleikarahúsið
Tilmelding tlf. 32 13 43 – 31 77 55
Hósdag 15.30 – 17.30 Hedvig Westerlund Sjónleikarahúsið
Tilmelding kl. 16 –18 tlf. 31 60 28
byrjar 1. okt.
Kr. 100,00 Tysdag 15.00 – 17.30 Hjørdís Johansen Dramaverkstaðið Hálfarneygur 2
byrjar 2. okt.
Kr. 100,00 Mikudag 15.30 – 18.00 - -
Kr. 100,00 Tilmelding tlf. 31 91 42 aftaná kl. 15.00 tlf. 31 77 55
Mánakvøld 19.00 – 21.35 Ambjørn Sivertsen Bridgehúsið
Skúlin byrjar mánadagin 21. oktober 2002. Neyðugt er at melda til sum skjótast.

Dimmalætting 311212